Høgni Hoydal
Sirið Stenberg
Hervør Pálsdóttir
Bjørg Brynhildardóttir Egholm
Ruth Vang
Bjarni K. Petersen
Eirikur í Jákupsstovu
løgtingsfólk

Broytingaruppskot

til

3. viðgerð av

løgtingsmáli nr. 101/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) (Longd gildistíð, nágreina ella fáa heimildir til at skipa fiskiskapin, at boða frá útluting, at sýta útlendskum skipum at taka ímóti vørum, veitingum og at umskipa o.tíl., at avhenda rættindi at fiska av felagskvotu, at geva undantak frá at landa í Føroyum við fráboðan o.a.)

b r o y t i n g a r u p p s k o t

Í § 1 verður nr. 1 strikað.

Nr. 2-13 verða eftir hetta nr. 1-12.

Viðmerkingar:
Leingjanin av loyvistíðini er ein munandi broyting í fiskivinnulóggávuni, sum sjálvsagt skuldi verið send í veruliga hoyring og verið viðgjørd í einari heild.

Í staðin hevur landsstýrismaðurin við einum samgonguskjali í hondini - sum longu á øðrum økjum hevur stórt ósamsvar millum bókstav og gerðir - uttan nakra veruliga viðgerð valt at koma í tingið við hesari stóru broytingini saman við øðrum smærri broytingum, sum hinvegin allar hava verið í hoyring.

Verður uppskotið hjá landsstýrismanninum samtykt, so er støða tikin til, at tað skulu minst 3 og mest sannlíkt 4 valskeið ganga, um so er, at politiska skipanin vegna Føroya fólk skal uppsiga veiðiloyvini. Tað er munandi torførari enn til dømis at broyta stýrisskipanarlógina. Hetta meta uppskotssetararnir ikki vera skilagott at gera uttan eina ítøkiliga viðgerð av hesum spurninginum, sum fylgir vanligu mannagongdunum fyri lógarsmíð, og mæla tí til, at spurningurin um loyvistíð verður tikin úr hesari lógarbroytingini.

Á Løgtingi 25. mai 2026

Høgni Hoydal Hervør Pálsdóttir Sirið Stenberg

Bjarni K. Petersen Bjørg Brynhildardóttir Egholm Ruth Vang

Eirikur í Jákupsstovu